## Vóni tað besta, men...

- Eg tori einiki at spáa. Tað er sjáldan, at teir spæla tveir góðar dystir upp í slag. Eg vóni tað besta, men tað kann eisini enda við skrædli, helt Sólbjørn Mortensen, sum vit eisini møttu á Vaglinum í morgun. Sólbjørn er sjálvur gamal landsliðsspælari, og var við í fimm landsdystum frá 1970-72. Dystirnir vóru móti Hetlandi, Orkneyoyggjunum og Íslandi. Í sambandi við landsdystin á Svangaskarði í kvøld hevur hann tveir hetlendingar búgvandi, sum hann kennir frá fólkadansi.



## Súkkla kring Føroyar í juli

Ársins útgáva av stóru súkklukappingini Statoil Kring Føroyar verður í døgunum 18. til 22. juli 2007. Kappingin verður hildin í 5 dagar, har ein kapping er um dagin. Málið hvønn dagin liggur við eina av Statoil støðunum runt landið. Kappast verður í Klaksvík, í Eysturoynni, á Sandoynni, í Suðuroy og á Streymoynni. Samanlagt verða súkklaðir 332 km. Høvuðskappingin er kappingin um bláu troyggjuna, hana vinnur tann sum er skjótastur á øllum teinunum tilsamans. Kappingin um fjallatroyggjuna vinnur tann, sum er skjótastur niðan um ymsar útvaldar brekkur, sum liggja á leiðini har kappingin er.




# Kvikhentur maður í slowmotion

**- Vit eru til nógvar ymiskar dystir millum ár og dag. Men at gera upptøkur her í Føroyum krevur sjálvandi sítt, sigur Peter Belmark.**
**Hóast sergrein hansara eru slowmotion-upptøkur, krevur hann at vera kvikur við fingrunum, tá avgerandi støður í einum dysti skulu vísast aftur og aftur í sjónvarpinum.**



*Nógv útgerð skal til og kvikhent fólk at fáa sum best burtur úr teimum.*
*– Vit hava djúpa virðing fyri dómarunum, sigur Peter Belmark*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

SJÓNVARPSDYSTUR
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Svangaskarð:** Við vøllin á Toftum standa fleiri stórir sjónvarpsbussar við merkinum »Digital Vision« á. Hvør teirra er betri útgjørdur enn hin við tekniskari útgerð.

Á takinum stinga stórir parabolar upp í loft. Uttanfyri standa í hópatali av kassum við upptøkutólum, inni í bussinum er teknisk útgerð til redigering og framleiðslu av sjónvarpi fyri hundraðtúsundtals krónur.

Tvey av hesum tólunum eru til slowmotion-upptøkur av einum dysti. Summi upptøkutól taka sær av teirri breiðu myndini, meðan onnur fylgja nærdystum, tacklingum og andlitsbragdinum á spælarum og áskoðarum.

Her krevst skjótleiki og ein vitan um, hvat sjónvarpshyggjarin ynskir at síggja. Og tað er júst hesar royndirnar, sum Peter Belmark hevur fingið sær hesi seinastu 10 árini sum slowmotion-operatør, sum tað eitur.

Hann er bert ein av mongum, sum tryggjar fótbóltshugaðum sjónvarpshyggjarum eitt gott upplivilsi av hvørjum einstøkum dysti. Hesi fólkini hava arbeitt nógv saman og eru so líðandi komin at kenna hvønn annan sera væl.

- Vit hava arbeitt so væl og so nógv saman gjøgnum tíðirnar, at vit vita noyaktiga hvat hvør einstakur ger. Eingin okkara er yvir hinum og eingin undir.

- Forholdið okkara millum er tí eisini so gott, at vit kunnu siga tað vit vilja við hini. Vit eru eitt gott team, hóast vit eru freelansarar og koma ymsastaðni frá, sigur Peter Belmark.

Seinnapartin í gjár vóru hann og starvsfelagar hansara í ferð við at draga káplar, rigga upptøkutólini til og tryggja alt tað tekniska undan dystinum móti Skotlandi í kvøld.



*10 upptøkutól verða á Svangaskarði í kvøld. Bert linsan til tað einstaka tólið kostar 700.000 kr. hvør*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

### Umaftur og umaftur

Túsundtals áskoðarar verða uttan iva til dystin á Svangaskarð í kvøld. Øll fáa ikki henda møguleikan, og mugu tí sita frammanfyri sjónvarpsskíggjan og fylgja dystargongdini.

Rundan um vøllin standa 10 upptøkufólk og gera sítt ítasta til at sjónvarpshyggjarar í Føroyum, Skotlandi og mongum øðrum londum fáa alt við í dystinum.

Aftanfyri hesi 10 upptøkufólkini er haraftrat ein hópur av øðrum fólkum til arbeiðis, millum annað Peter sjálvur sum hevur eina einstaka uppgávu at loysa í kvøld:

Uppgávan hjá honum er at spæla umaftur í slowmotion nakað av tí, sum hendir í dystinum. Her kann til

> *Vit hava djúpa virðing fyri arbeiðinum hjá dómarunum, tí tað kann ikki altíð vera eins lætt at taka røttu avgerðina*

> *Tað er í roynd og veru ikki annað ljós á stadion enn tað, sum kemur úr erva*